**hjá Pidda**
*á Toftum*

## Raskur leiðari til handilin hjá Pidda

Handilin hjá Pidda á Toftum sóknast eftir dugnaligum leiðara. Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum til rætta persónin

Hjá Pidda hevur leingi verið álitið hjá toftafólkum, og handilin leggur stóran dent á at nøkta tørvin á øllum gerandisvørum til kappingarførar prísir.

Sum leiðari hjá Pidda fært tú fulla ábyrgd av handlinum. Tú varðar av søluni, innkeypinum og fíggjarstøðuni, og tú skalt leiða arbeiðið hjá 12 ídnum fólkum.

Vit sóknast eftir einari eldsál, sum er til reiðar at taka eitt eyka tak, tá ið tað er neyðugt. Tað er umráðandi, at tú ert raskur og varðveitir yvirlitið, hóast nógvar uppgávar skulu loysast.

Útbúgving innan handilsvinnuna eingin treyt, men hinvegin er tað ein fyrimunur, um tú kanst vísa okkum á viðkomandi royndir.

Ljóðar hetta sum tú? Send so eina skrivliga umsókn innan 1. februar til:

**P/f Vørður**
Hoyvíksvegur 65
Postboks 1048
110 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til David Nordendahl á telefon 213550 ella teldupost david-n@post.olivant.fo

## ARBEIÐSMENN

Søkt verður eftir fólki, sum hevur royndir/áhuga í forskallingsarbeiði.

Søkt verður eftir fólki til jørð og kloakkarbeiði í meginøkinum og eftir formanni til arbeiðið í Hesti.

Byrjast kann beinanvegin

J&K

P/F J & K Petersen · Tel 31 50 60 / Fax 31 41 94
e-mail JKP@JKP.FO

**veitst tú ikki tað?**
**Sosialurin**

**FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**
The Faroes Islands Fisheries Inspection



## DEKKARAR TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

**3 størv sum fulltikin dekkari og 3 størv sum ófulltikin dekkari á skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys.**

**Fulltikin dekkari**
Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars taka lut í vanligum skipsarbeiði.

**Førleikakrøv**
- Lýkur krøvini sum fulltikin dekkari sambært kunngerð nr. 50 frá 12. mai 1999 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk.
- Heilsuváttan fyri sjófólk uttan avmarkingar og skikkaður til kagtænastu.
- Trygdarskeið. Fyrimunur er við gildugum trygdarskeiðsprógvi.
- Prógv, so sum vaktarhald, FRC, bátaførara, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur, ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.

**Ófulltikin dekkari**
Ert tú ung/ungur, og hevur hug til arbeiði umborð á skipi, er hetta ein góður møguleiki. Starvstíðin sum ófulltikin dekkari telur á sama hátt sum starvstíð við handilsskipum. Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars vanligt deksarbeiði.

Setanin sum ófulltikin dekkari er avmarkað til tvey ár.

**Førleikakrøv**
- Heilsuváttan fyri sjófólk uttan avmarkingar og skikkaður til kagtænastu.
- Trygdarskeið. Fyrimunur er við gildugum trygdarskeiðsprógvi.

Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí.

Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið. Størvini verða at seta sum skjótast.

Skrivlig umsókn við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 9. februar 2006 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskiveiðieftirlitið**
**Heykavegur 6**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tel. 353030 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.

www.fisk.fo

**Internet Sosialurin**